FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald


Inngangur ... 2
Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd ... 3
Altjóða bakstøði ... 10
Almenn fíggjarmál ... 12
Fíggjarlógaruppskotið 2015 ... 15
Inntøkur landskassans í 2015 ... 16
Útreiðslur landskassans í 2015 ... 17
Løgur í 2015 ... 17
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2014 ... 19
Rakstrarjáttanareftirlit ... 22
§ 1 Løgtingið ... 22
§ 2 Løgmansfyrisitingin ... 23
§ 3 Fíggjarmál ... 24
§ 5 Fiskivinnumál ... 25
§ 6 Vinnumál ... 26
§ 7 Mentamál ... 28
§ 11 Heilsumál ... 29
§ 12 Almannamál ... 31
§ 20 Inntøkur ... 33
Løgujáttanareftirlit ... 35



Búskaparfrágreiðing II, september 2014
Fyrivarni verður tikið fyri villum
Búskaparfrágreiðingin er tøk á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum
Ritstjórnað hevur Tórir Michelsen, búskaparfrøðingur
Argir, hin 30. september 2014

# Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2015 er grundað á uppskotið til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015, sum varð lagt fram í løgtinginum 26. mars í ár (løgtingsmál nr. 146/2013). Framrokningar av inntøkum og útreiðslum eru dagførdar, umframt at raðfest er av nýggjum á summum økjum.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu gongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum í framtíðini. Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, við tað at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum almennu Føroyar skulu bjóða.

Á inntøkusíðuni verða framdar ávísar raðfestingar og tiltøk, og metingar av nøkrum inntøkum eru endurmettar. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Við so óvissum fyritreytum er tað ein stór búskaparpolitisk avbjóðing at stýra eftir málinum at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2016. Til ber at gera forsagnir, har ið roynt verður at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin kann spáa um búskaparvøksturin fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans fleiri ár frameftir lesast við neyðugum fyrivarni.

Búskaparpolitiska avbjóðingin er, at tiltøk, sum minka um hallið á fíggjarlógini, kunnu samstundis virka tálmandi á eftirspurning og búskaparvøkstur og tí eisini á inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skatta- og avgjaldsinntøkurnar, minka í flestu førum eftirspurningin í búskapinum og tí eisini í ein ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2015 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar í løtuni. Vanligur landsskattur og meirvirðisgjald umboða umleið 65% av inntøkunum frá skattum og avgjøldum og hava tí stóran týdning fyri samlaðu inntøkurnar hjá landskassanum.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina seinastu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl. Eisini verða forsagnir hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum brúktar sum partur av grundarlagnum undir at meta um búskaparvøksturin.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2015 verður vøksturin í BTÚ mettur til umleið 4% (ársins prísir). Hesar metingar samsvara við nýggjastu metingarnar, sum eru komnar frá Búskaparráðnum. Grundað á eina fyrivarnisreglu, er metingin um búskaparvøkstur heldur varislig.

Skattir, ið eru grundaðir á inntøku og nýtslu, t.d. vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settir at fylgja áleið sama vøkstri sum BTÚ, t.e. umleið 4% í 2015 og 3% árini eftir. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt. Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini sum heild og útlitini fyri rentugongdina næstu 1-2 árini.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðan er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar- og løgujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er gjørt upp.

## Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd

Framgongdin, sum var í føroyska búskapinum í 2012 og 2013, er hildin fram og hevur tikið dik á seg fyrra hálvár í 2014. Framgongdin hevur eisini breitt seg til størri partar av búskapinum, millum annað til arbeiðsmarknaðin. Arbeiðsloysið er minkað, fleiri løntakararnir vera, privata nýtslan er vaksin og eftirspurningurin eftir lánum í peningastovnunum er vaksin. Vinnufyritøkur gera fleiri íløgur, og bæði vinnulív og húsarhald siga seg vera meira bjartskygd um framtíðina.

Mynd 1

Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2015




Viðm.: Tøini fyri 2014 og 2015 eru metingar frá Fíggjarmálaráðnum og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Fíggjarmálaráðnum og Búskaparráðnum.

Búskaparráðið hevur mett vøksturin í BTÚ fyri 2014 til 4,6% og 4,3% í 2015. Hetta samsvarar við metingar, sum Fíggjarmálaráðið áður hevur brúkt fyri 2014 og 2015 í sambandi við játtanarkarmar og fíggjarlóg. Sambært bráðfeingisuppgerð av tjóðarroknskapinum frá Hagstovu Føroya vaks búskapurin umleið 5% í 2013. Sostatt verður mett, at vøksturin verður áleið tann sami í 2014

sammett við í 2013. Mynd 1 vísir gongdina í BTÚ fyri árini 1998-2013 og forsagnir fyri 2014 og 2015.

Búskaparvøksturin í 2013 stavaði í stóran mun frá, at framleiðsla og avlop í alivinnuni vuksu, orsakað av høgum prísum. Útfluttu nøgdirnar av alifiski vóru at kalla óbroyttar sammett við 2012. Høgu prísirnir og stóru avlopini høvdu við sær, at ískoytið frá alivinnuni til vøksturin í búskapinum var óvanliga stórt í 2013. Prísirnir á alifiski hava somuleiðis verið góðir í 2014, og útfluttu nøgdirnar hava verið at kalla tær somu sum í 2013. Tí verður roknað við, at ískoytið til vøksturin frá alivinnuni verður nakað minni í 2014 sammett við í 2013.

Somuleiðis verður roknað við ískoyti til vøksturin í 2014 frá uppsjóvarvinnuni, sum bæði kemur av størri nøgdum og hægri miðalprísum. Handilstiltøkini hjá ES móti Føroyum verða sum kunnugt sett úr gildi, og tað at føroysk skip fáa betri atgongd at fiska í ES-sjógvi og í norskum sjógvi, fer at hava við sær hægri søluprísir í miðal sammett við í 2013.

Umframt ískoytið til vøksturin frá alivinnu og uppsjóvarvinnu, verður roknað við ávísum ískoyti frá privatum og almennum íløgum og vaksandi húsarhaldsnýtslu. Fleiri stórar privatar og almennar byggiverkætlanir eru í gongd, meðan aðrar byrja í 2014 og 2015. Hetta fer at síggjast aftur sum vaksandi virksemi millum annað í byggivinnuni og í atknýttum tænastuvinnum, til dømis flutningsvinnuni. Roknast kann tí við hampiliga stórum ískoyti til vøkstur frá hesum vinnunum, sum eru nógv tengdar at íløguvirkseminum, sum er í landinum.

Húsarhaldsnýtslan er vaksin nakað í ár, og roknað verður við, at hon heldur áfram at vaksa í 2014 og í 2015. Roknast kann við vaksandi húsarhaldsnýtslu, av tí at løntakararnir gerast fleiri, arbeiðsloysið minkar, umframt tað at realllønin er hækkandi hjá flestu løntakarum í løtuni (lønirnar eru hækkandi, meðan brúkaraprísir eru óbroyttir ella lækka). Harafturat hava føroysk húsarhald sum heild ikki nógva skuld, verður sammett við húsarhald í flestu øðrum londum í Vesturheiminum. Meginparturin av privatu nýtsluni í Føroyum er vendur móti innfluttum vørum, og roknast kann tí bara við avmarkaðum ískoyti til búskaparvøksturin frá meira húsarhaldsnýtslu.

Inntøkumetingar í fíggjarlógaruppskotinum byggja í flestu førum á, at vøksturin verður umleið 4% í 2014 og 2015. Í játtanarkørmunum fram til 2019 verður roknað við árligum vøkstri í BTÚ á 3% frá 2015 og frameftir (ársins prísir). Mynd 1 vísir gongdina í BTÚ síðsta árini og væntaðu gongdina næstu árini.

Fiskivinnan á heimligu leiðunum gevur í løtuni lítið ella einki ískoyti til vøksturin í búskapinum. Størsta orsøkin er vánaligur fiskiskapur (her verður serliga hugsað um fiskiskap eftir botnfiski á Landgrunninum). Avreiðingarprísir hava verið nakað hægri í 2014 sammett við 2013, men framleiðsla og avlop í vinnuni eru kortini sera lítil. Roknast kann bara við lítlum ella ongum ískoyti til vøksturin frá hesi vinnuni og frá atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi næstu árini. Toska- og hýsustovnurin undir Føroyum eru søguliga smáir og illa fyri, og útlit eru ikki til munandi frægari fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum næstu 1-2 árini.

*Vaksandi fólkatal og lækkandi arbeiðsloysi*

Arbeiðsloysið er lækkað úr 5,5 % í juli 2012 til 3,9 % í juli 2014. Tá ið arbeiðsloysið var hægst við ársbyrjan 2011, var tað omanfyri 7%. Harafturat er fólkafráflytingin av landinum hildin fram at minka í 2014, og nettofráflytingin er at kalla eingin í løtuni.

**Mynd 2**

**Árstíðarjavnaðir løntakarar í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til mai-2014**




Kelda: Hagstovan.

Talið av løntakarum veksur í løtuni 1-1,5% um árið, og løntakaratalið er nú tað hægsta síðani tíðliga í 2010. Talva 1 vísir løntakarar í juni síðani 2011 eftir høvuðsvinnubólkum. Løntakararnir eru vorðnir fleiri serliga í byggivinnuni og í privatum tænastuvinnum. Í fiski- og alivinnuni eru eisini fleiri fólk sett í starv síðani 2011, tó at løntakararnir fækkaðust nakað frá 2013 til 2014. Á mynd 2 síggjast arbeiðsloysi og løntakarar í tali síðani ársbyrjan 1985.

**Talva 1. Løntakarar eftir vinnubólkum í juni, býtt á ár**

| *Vinnubólkur* | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur 2013-14 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 3.795 | 4.000 | 3.879 | 3.813 | -66 | -1,7 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.040 | 3.032 | 2.995 | 3.264 | 269 | 9,0 |
| Privatar tænastuvinnur | 7.993 | 8.026 | 8.031 | 8.112 | 81 | 1,0 |
| Almenn o.o. tænasta | 8.919 | 8.960 | 8.961 | 8.976 | 15 | 0,2 |
| **Løntakarar tilsamans** | **23.747** | **24.018** | **23.866** | **24.165** | **299** | **1,3** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Fólkatalið veksur mest í miðstaðarøkinum kring Tórshavn, meðan fólkatalið er at kalla støðugt aðrastaðni. Arbeiðsloysið er eisini nakað ójavnt kring landið. Arbeiðsloysið verður til dømis mett til 9,5% í Sandoynni og 2,4% í Eysturoynni. Hetta er tekin um, at munur er á gongdini ymsastaðni í landinum og at framgongdin, sum hevur verið síðani 2012, hevur enn ikki breitt seg til øll øki í landinum. Talva 2 vísir gongdina í fólkatalinum í 2013 og í 2014 býtt á øki í landinum.

Stór fráflyting var av landinum í 2010 og 2011, tá ið stígur var á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og arbeiðsloysið vaks munandi. Miðskeiðis í 2012 fór fráflytingin kortini at minka aftur, og henda gongdin er hildin fram fyrra hálvár í ár. Í 2011 fluttu 400 fólk fleiri av landinum enn til Føroyar, og heldur gongdin fram í ár, verður lítil ella eingin fráflyting av landinum netto í 2014. Flytingin av

landinum netto er í størstan mun minkað av, at færri flyta av landinum, men flytingin til landið er eisini vaksin nakað. Mynd 3 og 4 vísa gongdina í til- og fráflyting úr Føroyum býtt á mánaðir og ár.

**Talva 2. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. juli 2013 til 30. juni 2014**

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. juni 2013 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 31. mai 2014 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.849 | 33 | -28 | 5.854 | 5 | 0,1 |
| Eysturoy | 10.652 | 34 | 24 | 10.710 | 58 | 0,5 |
| Tórshavnar økið* | 18.118 | 128 | 53 | 18.299 | 181 | 1,0 |
| Streymoyggin annars | 4.678 | 23 | -71 | 4.630 | -48 | -1,0 |
| Vágoy | 3.067 | 18 | 6 | 3.091 | 24 | 0,8 |
| Sandoy | 1.268 | -10 | 14 | 1.272 | 4 | 0,3 |
| Suðuroy | 4.682 | 17 | -2 | 4.697 | 15 | 0,3 |
| **Alt landið** | **48.314** | **243** | **-4** | **48.553** | **239** | **0,5** |

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.

*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 3**

**Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til juni-2014**




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4

Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2014




* Tølini fyri 2014 eru forsagnir grundaðar á fyrra hálvár 2014.
Kelda: Hagstovan.

Lønargjaldingarnar í Føroyum vaksa í løtuni 4-5% árliga, og vøksturin tykist hava tikið dik á seg fyrra hálvár í ár. Vøksturin er serliga innan byggivinnu og fiski- og alivinnu, men eisini innan privatu tænastuvinnurnar eru lønirnar vaksnar. Á mynd 5 og talvu 3 sæst gongdin í lønargjaldingum tilsamans og býtt á vinnugreinar. Lønargjaldingar í byggivinnuni stóðu mestsum í stað árini 2010 til 2013, men nú eru lønargjaldingarnar í byggivinnuni vaksnar munandi aftur orsakað av nógvu privatu og almennu íløgunum, sum verða gjørdar.

Talva 3. Lønir í høvuðsvinnugreinum, januar-august, 2011-2014, mió. kr.

| *Vinnubólkur* | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur 2013-14 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 796 | 853 | 830 | 873 | 43 | 5,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 539 | 555 | 541 | 601 | 60 | 11,0 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.463 | 1.546 | 1.555 | 1.624 | 70 | 4,5 |
| Almenn o.o. tænasta | 1.684 | 1.697 | 1.749 | 1.787 | 38 | 2,2 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **4.482** | **4.650** | **4.674** | **4.884** | **210** | **4,5** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Mynd 5 vísir eisini innflutningin av drúgvum, hálvdrúgvum og ódrúgvum nýtsluvørum. Á myndini sæst, at innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum er vaksandi og er vaksin nógv síðsta árið. Innflutningurin av ódrúgvum nýtsluvørum er eisini vaksin nakað, men ikki eins nógv og innflutningurin av drúgvari nýtsluvørum. Fyrra hálvár í ár er innflutningurin av vørum til beinleiðis húsarhaldsnýtslu sum heild vaksin um 3% sammett við fyrra hálvár 2013. Vøksturin í innflutningi er tekin um, at húsarhaldsnýtslan sum heild er vaksin í ár.

Mynd 5

Innflutningur, ódrúgvar og drúgvar og hálvdrúgvar nýtsluvørur og útgoldin løn, jan-1998 til aug-2014




Kelda: Hagstovan.

Brúkaraprístalið er lækkað umleið 1% seinast árið (mynd 6). Størsta orsøkin til, at prístalið lækkar er, at kappingin millum peningastovnarnir er herd, soleiðis at rentan á bústaðarlánum og býliskostnaðir eru lækkaðir munandi. Prísirnir á nýtsluvørum og tænastum eru at kalla óbroyttir, til dømis matur og drekka, flutningur og annað. Prísurin á olju er lækkaður nakað síðani ársbyrjan, sum eisini hevur havt við sær, at brúkaraprístalið ikki er hækkað í ár.

Mynd 6

Brúkaraprístalið, 2001 til 2014, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

Konjunkturvísitalið vísir eisini, at vinnulívið og húsarhald eru meira bjartskygd um framtíðina (mynd 7). Samlaða konjunkturvísitalið hækkaði úr 23 til 37 seinasta hálvárið. Samlaða vísitalið hevur ikki verið so høgt síðani januar 2007, áðrenn altjóða fíggjarkreppan byrjaði. Vísitalið hækkar fyri allar bólkar, tó ikki fyri tilfeingisvinnurnar, sum eru mestsum óbroyttar samanlagt í vísitalinum.

**Mynd 7**

**Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans**




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Bæði húsarhald og vinnulív eru munandi meira bjartskygd um framtíðina og vænta framgongd næsta árið. Vísitalið hækkar serliga fyri tænastuvinnurnar og byggivinnuna, sum merkja stóra framgongd í sølu og eftirspurningi. Hetta er tekin um, at samlaði eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er vaksandi.

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni*

Handilsjavnin í 2012 og í 2013 var nógv ávirkaður av, at fleiri skip og flogfør enn vanligt vórðu innflutt hesi árini. Harafturat vórðu nógvar íløgur gjørdar serliga í 2012, sum hevði meira innflutning av maskinum, amboðum og tilfari við sær. Oljuprísir vóru eisini høgir í 2012, sum eisini sæst aftur í innflutninginum tað árið. Innflutningurin í 2014 verður helst nakað minni sammett við 2012 og 2013, sum mest kemur av, at færri skip og flogfør verða innflutt.

**Mynd 8**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2013**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru ikki við. Tølini fyri 2014 eru metingar, sum eru grundaðar á fyrra hálvár 2014.
Kelda: Hagstovan.

Føroyski útflutningurin er vaksin støðugt síðani 2009 úr umleið 4 mia. kr. til omanfyri 6 mia. kr. í 2013. Vøksturin kemur serliga av gongdini í alivinnuni og uppsjóvarvinnuni við munandi størri nøgdum og hækkandi prísum. Mynd 8 vísir handilsjavnan fyri árini 1988-2013, umframt at mett er

um handilsjavnan fyri 2014. Hall var á handilsjavnanum í 2012, meðan handilsjavnin mestsum javnvigaði í 2013. Í 2014 verður sannlíkt hampiliga stórt avlop á handilsjavnanum aftur.

Síðstu árini hava avlop verið á føroyska gjaldjavnanum tey flestu árini (mynd 9). Høvuðsorsøkirnar til avlopini eru lønarinntøkur til føroyingar, sum arbeiða uttanlands, og heildarveitingin úr Danmark. Hall var á gjaldjavnanum í 2012, men roknast kann við avlopi aftur í 2013 og í 2014, við tað at hallið á handilsjavnanum í 2012 er burtur aftur í 2013 og 2014.

Mynd 9

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2012




Kelda: Hagstovan.

## Altjóða bakstøði

Framgongd er framvegis í heimsbúskapinum, tó at framgongdin er ójøvn í ymiskum londum. Stórur munur er á vøkstrinum og arbeiðsloysinum í ymiskum londum. Í USA, Stóra Bretlandi, Týsklandi og Japan er nakað av framgongd í búskapinum, meðan lítil ella eingin búskaparvøkstur sæst aðrastaðni í Vesturheiminum. Framgongdin í heimsbúskapinum fyrra hálvár í ár hevur verið heldur minni enn áður væntað. Í Evropa eru tekin um, at stígur er komin í framgongdina, sum sást í Evropa í 2013 og fyrra hálvár í 2014. Vøksturin í menningarlondum er minkaður nakað og hevur verið minni fyrra hálvár í ár, enn áður væntað.

Framgongdin í USA var somuleiðis heldur minni fyrra hálvár í ár, enn áður væntað. Hetta kemur serliga av umstøðum, sum ikki vera varandi framyvir, til dømis frá goymslubroytingum. Roknast kann tí við, at framgongdin í USA aftur tekur dik á seg seinni í ár og í 2015. Framgongdin í USA stavar í stóran mun frá vaksandi húsarhaldsnýtslu og innlendis eftirspurningi sum heild. Harafturat er fíggjarpolitikkurin í USA ikki táttaður eins nógv og í Evropa. Miðbankin í USA hevur eisini sett í verk stuðulstiltøk av ymiskum slagi, sum ikki í sama mun eru sett í verk í Evropa. Miðbankin í USA er líðandi farin undir at minka stuðulstiltøkini.

Í Evropa er vøksturin fyri tað nógva í Týsklandi og Stóra Bretlandi, meðan lítil vøkstur er aðrastaðni. Gongdin í Evropa er framvegis merkt av nógvu almennu og privatu skuldini, sum var íkomin, áðrenn fíggjarkreppan byrjaði. Húsarhald og fyritøkur leggja seg framvegis eftir at minka skuld, sum hevur við sær, at privatar íløgur og húsarhaldsnýtsla eru minkað nógv, síðani 2008. Samstundis eru treytirnar fyri lánveitingar táttaðar heldur meira í Evropa sammett við í USA. Útlán frá peningastovnum til vinnufyritøkur eru framvegis minkandi, sum óivað er tekin um, at hugurin

at gera íløgur er lítil, lánveitingar eru táttaðar umframt at útlitini fyri búskaparvøkstri í Evropa ikki eru góð.

Búskapargongdin í Evropa er darvað av lágari húsarhaldsnýtslu og av at vinnufyritøkur gera færri íløgur enn vanligt. Samstundis er fíggjarpolitikkurin táttaður í flestu londum í Evropa, sum eisini virkar darvandi fyri eftirspurning og búskapargongdina sum heild. Útlitini fyri búskaparvøkstri í Evropa næstu árini eru sum heild vánalig.

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ 2011-2015 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 1,8 | 2,8 | 1,9 | 1,7 | 3,0 |
| Evruøkið | 1,5 | -0,7 | -0,4 | 1,1 | 1,5 |
| Stóra Bretland | 1,1 | 0,3 | 1,7 | 3,2 | 2,7 |
| Ídnaðarlond tilsamans | 1,7 | 1,4 | 1,3 | 1,8 | 2,4 |
| Menningarlond | 6,2 | 5,1 | 4,7 | 4,6 | 5,2 |
| Heimsbúskapurin | 3,9 | 3,5 | 3,2 | 3,4 | 4,0 |
| *Føroyar** | *0,1* | *0,8* | *5,8* | *N/A* | *N/A* |

* Uppgerðirnar fyri Føroyar eru brottutjóðarúrtøka í ársins prísum býtt við brúkaraprístali.
*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 24. juli 2014.*

Í løtuni er vandi fyri lágum vøkstri, høgum arbeiðsloysi og lítlum ella ongum prísvøkstri (deflasjón) í Evropa í eitt longri tíðarskeið. Líknandi fyribrigdi við lágum vøkstri og ongum prísvøkstri vóru í Japan eftir fíggjarkreppuna, sum byrjaði har tíðliga í 1990'unum.

Nógv bendir á, at lági vøksturin í Evropa og sum eisini kann gerast eitt varandi fyribrigdi næstu 10-15 árini, er eitt *bygnaðarligt fyribrigdi* heldur enn eitt *stutttíðar fyribrigdi*. Serliga trý viðurskifti tala fyri, at lági vøksturin er av bygnaðarligum slagi og tí kann gerast varandi. Í fyrra lagi verða óvanliga fáar privatar íløgur gjørdar. Hetta hevur við sær, at framleiðsluorkan í Evropa ikki er vaksandi. Í øðrum lagi hevur *produktivitetsvøksturin* í Evropa og aðrastaðni í Vesturheiminum verið óvanliga lágur síðstu umleið 10 árini. Í triðja lagi broytist fólkasamansetingin (burðaravlopið minkar, fólk liva longri og lutfalsliga færri eru í arbeiðsførum aldri), sum hevur við sær, at arbeiðsmegin ikki veksur eins nógv og áður. Størsta orsøkin til, at arbeiðsmegin veksur í Evropa í løtuni er tilflyting av fólki í arbeiðsførum aldri til Evropa.

Vøksturin í Japan kemur í stóran mun av stimbrandi fíggjarpolitikki og peningapolitiskum stuðulstiltøkum. Fíggjarpolitikkurin verður væntandi táttaður nakað í Japan, sum frálíður, og peningapolitisku stuðulstiltøkini verða væntandi minkað so líðandi í 2015. Hetta fer sannlíkt at hava við sær lægri vøkstur í 2015 sammett við 2014.

Vøksturin í menningarlondum er 4-5% um árið, í USA 1,5-2%, og í Evropa er vøksturin umleið 1% um árið (talva 4). Arbeiðsloysið í Evropa er um 11-12% í miðal, og roknast kann við høgum arbeiðsloysi fleiri ár frameftir, við tað at lítil vøkstur er væntandi í Evropa næstu árini, millum annað av nógvari almennari og privatari skuld. Harafturat kann roknast við, at fíggjarpolitikkurin verður táttaður, so hvørt sum myndugleikar í Evropa royna at minka hall í almenna geiranum.

Óvissan um gongdina í heimsbúskapinum er yvirhøvur framvegis stór, og óvæntaðar hendingar kunnu koma fyri, sum hava við sær, at stígur kemur aftur í búskapin í Evropa. Harafturat er rentustigið í flestu londum í heiminum søguliga lágt, umframt at miðbankar hava sett óvanlig stuðulstiltøk í verk. Hóast hesi tiltøk, er lítil vøkstur og støðugt høgt arbeiðsloysi í fleiri londum í Vesturheiminum og serliga í Evropa.

Í løtuni eru útlit til, at rentustigið verður óvanliga lágt í øllum førum alt 2014 og meginpartin av 2015. Fleiri meta, at rentustøðið í Evropa verður óvanliga lágt í longri tíð, í øllum førum næstu umleið trý árini. Enn er ikki greitt, eftir hvørji tíðarætlan miðbankar í Vesturheiminum fara at minka ymisku stuðulstiltøkini, sum eru sett í verk, men útlit eru til, at tað í minsta lagi kann taka 1-2 ár, áðrenn stuðulstiltøkini eru sett úr gildi. Hækkar rentustigið skjótari enn væntað ella hækka oljuprísir óvæntað nógv næstu árini, kann roknast við lægri vøkstri næstu árini.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og almenna geiranum sum heild síðstu árini. Mynd 10 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við mettum tølum fyri 2014 og tølum úr fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015.

Myndin vísir millum annað, at inntøkurnar ávirkast meira av sveiggjunum í búskapinum sammett við útreiðslurnar. Útreiðslurnar hava verið meira støðugt vaksandi síðani 1997, meðan inntøkurnar eru vaksnar minni og meira óstøðugt. Harvið hevur landskassin havt hall síðani 2008 og fer væntandi at hava hall fram til 2015.

**Mynd 10**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2017**




Viðm.: Tølini fram til 2013 eru rokskapartøl.
* Tølini fyri 2014 eru fyribils mett tøl, meðan tølini fyri 2015-17 eru úr uppskotinum til fíggjarlóg. Fyri 2015 er lagt upp fyri ætlanunum at flyta eldraøkið til kommunurnar at umsita.
** Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
*** Væntandi verða óbrúktar løgujáttanir á umleið 71 mió. kr í 2014, sum kunnu flytast til seinni ár. Hesar játtanir eru ikki við í uppgerðunum árini 2015 og frameftir, tí óvist er, nær játtanirnar verða brúktar.
Kelda: Gjaldstovan og Hagstovan.

Mynd 11 vísir bruttoskuld og innistandandi hjá landsstýrinum. Bruttoskuldin hjá landinum er vaksin munandi síðani 2007, men landið hevur enn ikki nógva skuld sammett við fleiri onnur lond

í Vesturheiminum. Er rikni fíggjarpolitikkurin ikki haldførur yvir longri áramál, er vandi fyri, at kredittvirðið hjá landinum kann versna og rentustøðið hjá landinum hækka, sum frálíður. Tí er umráðandi, at hallið hjá landinum minkar og javnvág fæst næstu árini, sum eisini hevði styrkt haldførið á rikna fíggjarpolitikkinum.

Mynd 11

Landskassans bruttoskuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2014




* Uppgerðin fyri 2014 er frá september 2014 og er ikki endalig.
Kelda: Gjaldstovan, Leiðslukunningarskipanin.

Fyribils og ávegis uppgerðir hjá Fíggjarmálaráðnum av bygnaðarliga hallinum hjá tí almenna vísa, at tað almenna hevði lutfalsliga stórt hall í 2013, hóast lagt verður upp fyri konjunkturstøðuni í landinum. Hetta merkir, at neyðugt verður við ávísum varandi tiltøkum bæði innan inntøkur og útreiðslur hjá tí almenna til tess at betra javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur og harvið haldførið í almenna búskapinum yvir longri áramál.

Mynd 12

Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), mió. kr., 1998 til 2012




Kelda: Hagstovan.

Greitt er, at útreiðslurnar hjá landinum á millum annað heilsu- og almannaøkinum fara at vaksa munandi næstu árini orsakað av broyttari aldurssamanseting og betri viðgerðarmøguleikum. Hetta fer eisini at hava við sær eitt trýst á útreiðslurnar hjá landinum og harvið á haldførið í almenna búskapinum. Eitt tiltak, sum hevði bøtt um hesa støðu, er pensjónsnýskipanin, sum fyri ein part er sett í gildi og sum enn verður arbeitt við.

*Fíggingartørvurin hjá landinum næstu árini*
Landsstýrið tók lánsbrævalán á 1,1 mia. kr. í mars mánaða í ár. Gildistíðin á láninum var umleið fimm ár, og rentan á láninum var lagalig (1,8% p.a.), og hetta merkir, at landið hevur gott kredittvirði. Harafturat hevur kredittmetingarstovnurin Moody's endurtikið skoðsmálið av lánførinum (ratingina) hjá landinum í september í 2013. Sostatt bendir alt á, at kredittvirðið hjá landinum framhaldandi verður gott næstu 1-2 árini. Skuldarstrategiin hjá landinum fevnir millum annað um, at lánsbrævalánini hava eina eina ávísa stødd sum er í minsta lagi 1 mia. kr., til tess at skapa áhuga fyri lánsbrøvunum og fyri at tryggja, at tey vera umsetilig.

Miðalgjaldførið hjá landinum higartil í ár er um 2,5 mia. kr., sum er væl omanfyri minsta gjaldførið fyri 2014 á umleið 2 mia. kr. Í 2015 hækkar minsta gjaldførið til 2,15 mia. kr., umframt at landið væntandi fær hall í 2014 og 2015, sum skulu fíggjast av gjaldførinum hjá landinum. Í 2015 fellur eitt lánsbrævalán hjá landinum á 1,1 mia. kr. til gjaldingar. Tí verður neyðugt hjá landsstýrinum at taka lánsbrævalán aftur í 2015, sum skal fíggja gjaldførishall hjá landinum í 2015, umframt at neyðugt verður at taka lán til at rinda skuld aftur, sum fellur til gjaldingar í 2015. Landsstýrið hevur í sambandi við lántøkuna í 2014, endurfíggjað umleið 250 mió. kr. av skuldini, sum fellur til gjaldingar í 2015.

## Fíggjarlógaruppskotið 2015

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2015 tekur støði í teimum játtanarkørmum, sum Løgtingið samtykti í mai í ár. Broytingar eru í uppskotinum samanborið við játtanarkarmarnar, av tí at fyritreytir eru broyttar bæði fyri inntøkur og útreiðslur, umframt at raðfest er øðrvísi á summum økjum.

Talvan niðanfyri vísir RLÚ-úrslitið fyri árini 2015 til 2017 í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015 samanborið við somu ár í samtyktu játtanarkarmarnar fyri 2015-19.

**Fíggjarlógaruppskot 2015 samanborið við játtanarkarmar fyri 2015-17**

| *Mió. kr.* | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|
| RLÚ-úrslit í samtyktu játtanarkørmunum 2015 | -196,7 | 4,8 | 33,5 |
| RLÚ-úrslit í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015 | -139,7 | 5,3 | 78,8 |
| Munur | 57,0 | 0,5 | 45,3 |

### Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, eru í 2015 framroknaðar við metta vøkstrinum í ársins prísum. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum. Rakstrarjáttanir í 2015 eru íroknað lønar- og prísvøkstur. Eftir hetta er framroknað við føstum prísum.

### Broytingar sammett við játtanarkarmar

Høvuðsbroytingarnar frá játtanarkørmunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 2015 eru hesar:

- Inntøkumetingar eru broyttar bæði orsakað av inntøkutiltøkum og orsakað av hækkaðum inntøkumetingum
- Serstakliga metingar um vanliga landsskattin og meirvirðisgjald eru hækkaðar nakað

### Raðfestingar innan rakstur

Av raðfestingum í fíggjarlógaruppskotinum 2015 kunnu nevnast:

- Viðgerð og fyribyrging av krabbameinssjúkum so sum bróstkrabba og prostatakrabba
- Endurvenjing
- Serviðgerð uttanlands
- Styrkur til stakar uppihaldarar
- Pensjónistar við serliga truplum korum
- Sernámsskúlaøkið
- Hægri útbúgvingar
- Hægri játtan til Strandfaraskip Landsins
- Játtanin til Barsilsskipanina hækkar
- Talgildar Føroyar

**Raðfestingar innan løgur**

Av raðfestingum innan løgur kunnu nevnast:

- Skúladepilin við Marknagil
- Orkuumvæling av almennum bygningum (ESCO)
- Landssjúkrahúsið
- Viðareiðistunnilin
- Bústovnar
- Tekniski skúli í Klaksvík
- Studentaskúli og HF-skeiðið í Eysturoy

## Inntøkur landskassans í 2015

Inntøkurnar eru mettar til 4.545 mió. kr. í 2015. Harav eru nettoinntøkur frá skattum 1.965 mió. kr. Avgjøld og tollur eru 2.166 mió. kr. netto. Heildarveiting er 642 mió. kr. Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2014.

Samlaðu inntøkurnar eru mettar at minka frá 2014 til 2015 orsakað av, at í uppskotinum er lagt upp fyri, at eldraøkið verður flutt til kommunurnar at umsita frá 1. januar 2015. Eldraøkið verður fíggjað við flytingum av inntøkum frá landinum til kommunur. Hetta sæst í talvuni niðanfyri undir flytingar, sum meira enn tvífaldast frá 2014 til 2015. Harafturat fellur skattur av pensjónsinngjøldum til kommunurnar frameftir. Hetta merkir, at samlaðu skattainntøkurnar hjá landinum væntandi minka í 2015, sum eisini sæst í talvuni niðanfyri.

**Meting av inntøkum landskassans í 2013 og 2014**

| *mió. kr.* | **R-2013** | **FL-2014** | **Meting 2014** | **FL-2015** | **Munur frá FL14 til FL15 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.976 | 2.148 | 2.088 | 1.965 | -8,9% |
| Avgjøld og tollur | 1.887 | 1.970 | 2.104 | 2.166 | 9,8% |
| Ymsar inntøkur | 33 | 57 | 59 | 88 | 54,4% |
| Flytingar | -144 | -145 | -147 | -316 | -117,9% |
| Heildarveiting o.t. | 624 | 632 | 632 | 642 | 2,7% |
| **Tilsamans** | **4.376** | **4.662** | **4.736** | **4.545** | **-2,5%** |

## Útreiðslur landskassans í 2015

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur (netto) verða mettar til 4.685 mió. kr. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 4.324 mió. kr., løguútreiðslurnar eru 276 mió. kr., og rentuútreiðslurnar eru 85 mió. kr. Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar. Høvuðsorsøkin til at rakstrarútreiðslur minka frá 2014 til 2015 er, at eldraøkið verður lagt til kommunurnar at umsita.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2014 og 2015**

| *mió. kr.* | **R-2013** | **FL-2014** | **Meting 2014** | **FL-2015** | **Munur FL-2015 til FL-2014 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 4.463 | 4.558 | 4.598 | 4.324 | -5,1% |
| Rentur, netto | 94 | 80 | 32 | 85 | 6,3% |
| Løgur | 237 | 277 | 396 | 276 | -0,4% |
| **Tilsamans** | **4.794** | **4.915** | **5.026** | **4.685** | **-4,7%** |

## Løgur í 2015

Løgukarmurin í fíggjarlógaruppskotinum 2015 er 276 mió. kr. Aftrat hesum eru óbrúktar løgujáttanir frá 2014, sum hava átekning, soleiðis at tær kunnu flytast yvir ár. Sostatt kann roknast við, at meira verður brúkt av løgukarminum í 2015 enn tær 276 mió. kr., sum eru játtaðar í fíggjarlógini. Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 276 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015 er raðfestur. Játtanin til felagið P/F Skálafjarðar- og Sandoyartunnilin verður viðgjørd sum stuðulsjáttan.

| **Løguætlanin fyri 2015 *(mió. kr.)*** | |
|---|---|
| **Løgur §1 - §15 tilsamans** | **275.950** |
| **§2 Løgmansfyrisitingin** | **2.000** |
| Umbygging í Tinganesi | 2.000 |
| **§3 Fíggjarmálaráðið (fevnir eisini um gomlu §15)** | **71.700** |
| **Annað tilsamans** | **13.000** |
| Umvæling av almennum bygningum | 22.000 |
| Almennir bygningar, søla | -9.000 |
| **Nýggir landsvegir** | **51.500** |
| Dagføring av brúm, tunlum og vegum | 4.000 |
| Trygdartiltøk | 6.100 |
| Vegagerð í Kallsoy, vegir og tunlar | 2.000 |
| Ferðsluætlan Vágar | 3.000 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 |
| Tunnil til Viðareiðis | 35.500 |
| Múli | 1.000 |
| **Havnir** | **2.000** |

| | |
|---|---|
| **§ 6 Vinnumálaráðið** | **32.000** |
| SSL - Suðuroyarskip | 4.550 |
| SSL - Ternan | 1.200 |
| SSL - Nólsoyarskip | 21.850 |
| SSL - Umvælingar av smærri skipum | 1.900 |
| SSL - Søla av smærri skipum | -200 |
| SSL - Tólbúnaður | 1.500 |
| SSL - Sam | 1.200 |

| | |
|---|---|
| **§ 7 Mentamálaráðið** | **121.000** |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 12.000 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 12.000 |
| Skúladepil við Marknagil | 155.000 |
| Søla av bygningum | -60.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 1.000 |
| Kirkjubømúrurin | 1.000 |

| | |
|---|---|
| **§ 11 Heilsumálaráðið** | **35.000** |
| Medicoteknisk tól | 9.000 |
| Landssjúkrahúsið | 25.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 1.000 |

| | |
|---|---|
| **§ 12 Almannamálaráðið** | **19.250** |
| Sambýlið í Tórshavn, til fólk við serligum avbjóðingum | 10.600 |
| Vardir bústaðir í Eysturoynni í Norðoyggjum | 1.500 |
| Virknis- og umlættingardepil á Sandoynni | 7.150 |
| Sambýli til autistar og menningartarnað í Sandoy | 5.950 |

| | |
|---|---|
| **Løgur § 1 - § 12 tilsamans** | **275.950** |

## Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2014

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst eitt yvirlit yvir hvørjar játtanir (høvuðskontur), ið hildnar verða fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið. Her verða bæði tiknar við eykajáttanir og játtanir, har ið mett frávik verður, tá ið fíggjarárið er av.

**Meting av úrsliti landskassans í 2014 sammett við fíggjarlógina fyri 2014**

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.611.740 | 4.685.000 | 73.300 | 1,6% |
| Útreiðslur | 4.835.309 | 4.993.659 | 158.350 | 3,3% |
| *-harav brúkt av løgujáttanum frá eldri árum* | | 118.577 | | |
| **RLÚ-úrslit** | **-223.569** | **-308.659** | **-85.050** | **-38,0%** |
| **RLÚ-úrslit uttan støðlaðar játtanir** | | **-190.082** | **33.487** | **15,0%** |

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar § 1 til § 20 (vanligir postar). Aftrat hesum koma serinntøkur á § 55 á 4,8 mió. kr. (niðurlaðing av Búnaðargrunninum). RLÚ1-úrslitið verður væntandi umleið -310 mió. kr. í 2014, meðan RLÚ 2-úrslitið væntandi verður umleið -305 mió. kr. í 2014. Størsta orsøkin til, at hallið væntandi verður størri enn væntað í fíggjarlógini fyri 2014, er at brúkt verður av løgujáttanum frá undanfarnum árum. Hetta ávirkar roknskaparliga úrslitið hjá landskassanum í 2014.

Metta RLÚ-úrslitið hjá landskassanum verður 85 mió. kr. verri sammett við fíggjarlógina. Sum víst verður á aðrastaðni, veksur hallið sammett við fíggjarlógina, fyrst og fremst av tí at brúkt verður av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum.

Mett verður, at inntøkur landskassans í 2014 verða samanlagt 4.685 mió. kr., meðan útreiðslurnar verða samanlagt 4.994 mió. kr. Hetta er ávikavist 1,6 og 3,3% hægri enn upprunaliga mett í fíggjarlógini fyri 2014. Hetta hevur við sær, at RLÚ-úrslitið væntandi verður -309 mió. kr. í 2014.

### Meting av inntøkum landskassans í 2014 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki

| *1.000 kr.* | **R-2013** | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -136.912 | -113.000 | -117.700 | -4.700 | -4,2% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 42.581 | 33.000 | 86.219 | 53.219 | 161,3% |
| Skattainntøkur | 1.976.094 | 2.147.940 | 2.107.400 | -40.500 | -1,9% |
| Avgjøld og tollur | 1.866.841 | 1.969.900 | 2.103.700 | 133.800 | 6,8% |
| Ymsar inntøkur | 62.834 | 91.500 | 60.013 | -31.487 | -34,4% |
| Flytingar | -156.415 | -153.000 | -190.000 | -37.000 | -24,2% |
| Heildarveiting o.t. | 632.200 | 635.400 | 635.400 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.287.221** | **4.611.740** | **4.685.032** | **73.330** | **1,6%** |

Inntøkurnar eru tilsamans 73 mió. kr. hægri enn mett, tá ið fíggjarlógin varð gjørd. Frávikið stavar serliga frá, at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi og vanligum landsskatti eru hægri enn mettar. Harafturat eru rentuinntøkurnar av innistandandi hægri enn upprunaliga mettar orsakað av kursjavnan vegna lækkandi rentustøði. Uppgerðarhátturin, sum brúktur verður til rentuinntøkurnar av gjaldførinum hjá landinum, hevur við sær, at kursjavnan sæst alt fyri eitt, heldur enn at verða javnað yvir gildistíðina á virðisbrøvunum.

### Meting av útreiðslum landskassans í 2014 sammett við fíggjarlógina eftir játtanarslagi

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 167.817 | 166.775 | -1.042 | -0,6% |
| Rakstrarjáttan | 3.000.354 | 3.015.994 | 15.640 | 0,5% |
| Løgujáttan | 276.950 | 395.527 | 118.577 | 42,8% |
| Lógarbundin játtan | 1.390.188 | 1.415.363 | 25.172 | 1,8% |
| **Tilsamans** | **4.835.309** | **4.993.659** | **158.350** | **3,3%** |

Væntaða hækkingin í útreiðslunum er tilsamans 158 mió. kr. sammett við upprunaligu játtanina. Hækkingin kemur serliga av, at løgujáttanir fyri tilsamans 184 mió. kr. eru fluttar frá eldri árum. Av hesum verða væntandi brúktar umleið 110 mió. kr. í 2014. Løgujáttanin á fíggjarlógini var tilsamans 277 mió. kr., meðan metta nýtslan fyri 2014 av løgujáttanum tilsamans er umleið 395 mió. kr.

Á §6 hava lógarbroytingar í sambandi við Barsilskipanina, sum komu í gildi 24. mai 2014, og ein úrskurður frá kærunevndini við sær, at útreiðslurnar til Barsilsskipanina kunnu væntast at vera útvið 13 mió. kr. hægri enn játtanin í upprunaligu fíggjarlógini. Til hetta endamál er eykajáttan umbiðin, umframt at eykajáttan er umbiðin til Strandfaraskip landsins.

Á §11 eru eykajáttanir umbidnar til serstakan sjúkrahúsheilivág og til serviðgerð uttanlands á tilsamans 8 mió. kr. Á §12 eru eykajáttanir umbidnar til arbeiðsfremjandi tiltøk og til fólkapensjón á tilsamans 16 mió. kr. Verður sæð burtur frá løgujáttanum, stava størstu frávikini frá, at ov lítið

hevur verið játtað til lógarbundnar játtanir upprunaliga, og at neyðugt tí hevur verið at biðja um eykajáttanir í fíggjarárinum.

**Meting av inntøkum og útreiðslum landskassans í 2014 sammett við fíggjarlógina eftir grein (løgur og rakstur)**

| *1.000 kr.* | | FL-2014 | Meting 2014 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 45.700 | 47.700 | 2.000 | 4,4% |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 66.949 | 64.949 | -2.000 | -3,0% |
| § 3 | Fíggjarmál | 445.415 | 467.693 | 22.278 | 5,0% |
| § 5 | Fiskivinnumál | 173.305 | 173.305 | 0 | 0,0% |
| § 6 | Vinnumál | 322.677 | 352.450 | 29.773 | 9,2% |
| § 7 | Mentamál | 1.067.464 | 1.133.220 | 65.756 | 6,2% |
| § 11 | Heilsumál | 966.081 | 976.543 | 10.462 | 1,1% |
| § 12 | Almannamál | 1.747.718 | 1.777.799 | 30.081 | 1,7% |
| | Útreiðslur tilsamans | 4.835.309 | 4.993.659 | 158.350 | 3,3% |
| § 20 | Inntøkur | 4.611.740 | 4.685.032 | 73.300 | 1,6% |
| | **RLÚ -úrslit** | **-223.569** | **-308.659** | **-85.050** | **-38,0%** |

Í talvuni omanfyri eru vístar bæði stuðulsjáttanir, rakstrarjáttanir, løgujáttanir og lógarbundnar játtanir. Verður hugt eftir ymsu greinunum, sæst at serliga § 6, § 7 og § 12 víkja frá upprunaligu játtanini á fíggjarlógini. Frávikini stava í størstan mun frá at brúkt er av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum, umframt frá lógarbundnum játtanum.

## Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum hjá aðalráðunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri, við tað at serstakt løgujáttanareftirlit er í frágreiðingini eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

## § 1 Løgtingið

**Játtanarliga støðan í september 2014**

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 10.1.03. | Løgtingsarbeiði | Rakstrarjáttan | 2.000.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **2.000.000** | |

**Meting av útreiðslum á § 1 í 2014 sammett við fíggjarlógina fyri 2014**

| *1.000 kr.* | FL-2014 | Meting 2014 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 40.200 | 42.200 | 2.000 | 5,0% |
| Lógarbundin játtan | 5.500 | 5.500 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **45.700** | **47.700** | **2.000** | **4,4%** |

# § 2 Løgmansfyrisitingin

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.02. | Løgmansskrivstovan | Rakstrarjáttan | -2.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **-2.000.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 2 í 2014 sammett við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 9.700 | 9.700 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 55.249 | 53.249 | -2.000 | -3,6% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **64.949** | **62.949** | **-2.000** | **-3,1%** |

# § 3 Fíggjarmál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.23. | Landsins ognir | Rakstur | 800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 18.1.01. | Tænastumannaeftirlønir | Lógarbundin | 900.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 18.1.04. | Læraraeftirlønir | Lógarbundin | 2.100.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 18.1.07. | Eftirlønir innan heilsuverkið | Lógarbundin | -400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 18.2.04. | Danskar eftirlønir | Lógarbundin | -100.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.2.01. | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | Lógarbundin | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 22.4.01. | Stuðul til rentuútreiðslur | Lógarbundin | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **2.800.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 3 í 2014 samanborið við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | FL-2014 | Meting 2014 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 15.200 | 15.200 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 186.665 | 187.465 | 800 | 0,4% |
| Lógarbundin játtan | 158.250 | 160.250 | 2.000 | 1,3% |
| **Tilsamans** | **360.115** | **362.915** | **2.800** | **0,8%** |

# § 5 Fiskivinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 34.2.01. | Fiskiveiðieftirlitið | Rakstur | 600.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 34.2.22. | Flutningsstuðul | Lógarbundin | -600.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **0** | |

## Meting av útreiðslum á § 5 í 2014 sammett við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 18.580 | 17.980 | -600 | -3,2% |
| Rakstrarjáttan | 152.225 | 152.825 | 600 | 0,4% |
| Lógarbundin játtan | 2.500 | 2.500 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **173.305** | **173.305** | **0** | **0,0%** |

# § 6 Vinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---:|---|
| 13.4.04. | Marknaðarføra Føroyar | Stuðul | 500.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 14.1.10. | Útlendingastovan | Rakstur | -200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 32.1.04. | Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi | Stuðul | -150.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 35.1.08. | Sjóvinnustýrið | Rakstur | 600.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 37.2.04. | Endurgjald til skipasmíð | Stuðul | 373.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 37.5.04. | Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Rakstur | 400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 38.2.01. | Strandfaraskip landsins | Rakstur | 3.450.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 38.5.01 | Ferðaráð Føroya | Rakstur | -1.000.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 38.5.02 | P/F Visit Faroe Islands | Stuðul | 500.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 39.4.01. | Barsilsskipan | Lógarbundin | 12.800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 39.4.04. | Umsiting av barsilskipan | Rakstur | 350.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **17.623.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 6 í 2014 samanborið við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 19.875 | 21.098 | 1.223 | 6,2% |
| Rakstrarjáttan | 205.102 | 208.702 | 3.600 | 1,8% |
| Lógarbundin játtan | 83.300 | 96.100 | 12.800 | 15,3% |
| **Tilsamans** | **308.277** | **325.900** | **17.623** | **5,7%** |

# § 7 Mentamál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---:|---|
| 23.2.01 | Fólkaskúlin | Rakstur | 3.100.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 23.2.03 | Stuðul til fólkaskúlar | Stuðul | -600.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 23.6.24. | ES-granskingarskrá | Stuðul | -300.000 | Eykajáttan samtykt í september |
| 23.7.04. | Lestrarstuðul | Lógarbundin | -1.400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 23.7.05 | Lestrarlán | Stuðul | -800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 24.3.03. | Søvn landsins | Rakstur | 700.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **700.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 7 í 2014 sammett við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | FL-2014 | Meting 2014 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Stuðulsjáttan | 77.484 | 75.784 | -1.700 | -2,2% |
| Rakstrarjáttan | 762.102 | 765.902 | 3.800 | 0,5% |
| Lógarbundin játtan | 123.878 | 122.478 | -1.400 | -1,1% |
| **Tilsamans** | **963.464** | **964.164** | **700** | **0,1%** |

# § 11 Heilsumál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.55. | KT-øki | Rakstur | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.1.10. | Koppsetingar | Lógarbundin | -1.300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.03. | Heilsutrygdarveitingar | Rakstur | 4.600.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.06. | Økisheilsuskipanin | Rakstur | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.08. | Apoteksverkið | Rakstur | -4.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.11. | Ílegusavnið | Rakstur | 400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.04. | Landssjúkrahúsið | Rakstur | 900.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 20.3.19. | Serstakur sjúkrahúsheilivágur | Rakstur | 2.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.20. | Serviðgerð uttanlands | Rakstur | 6.100.000 | Eykajáttanir í mai og september |
| 20.3.23. | Umsiting av sjúklingatrygging | Rakstur | -300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.30. | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu | Rakstur | -400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **7.500.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 11 í 2014 samanborið við fíggjarlógina fyri 2014

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 975 | 975 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 917.906 | 926.606 | 8.800 | 1,0% |
| Lógarbundin játtan | 8.200 | 6.900 | -1.300 | -15,9% |
| **Tilsamans** | **927.081** | **934.981** | **7.500** | **0,8%** |

# § 12 Almannamál

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.2.07. | Lánsafturgjald | Stuðul | 35.000 | Mett frávik |
| 21.1.06. | KT-heildarskipan til Almannastovuna | Rakstur | -260.000 | Eykajáttan á 1,6 mió. kr. samtykt í mai. Støðlað játtan frá 2010 á 1.860 tús. kr. inntøkuførd í ár |
| 21.3.01. | Barnavernd | Lógarbundin | -800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.03. | Einkjubarnastyrkur | Lógarbundin | -200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.04. | Barnapeningur veittur í forskoti | Lógarbundin | -500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.06. | Barnaískoyti | Lógarbundin | -400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.13. | Ættleiðingarstuðul | Lógarbundin | -425.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.4.01. | Dagpeningaskipan | Lógarbundin | 1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.6.09. | Trivnaðartænastur | Rakstur | -1.600.000 | Eykajáttan í mai |
| 21.6.10. | Ansingarsamsýning | Lógarbundin | -4.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.6.14. | Lán til ellis- og røktarheim | Stuðul | 3.500.000 | Eykajáttan í mai |
| 21.6.18. | Studningslán til eldrabústaðir | Stuðul | -3.500.000 | Eykajáttan í mai |
| 21.7.01. | Vanlig forsorg | Lógarbundin | 1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.7.02. | Arbeiðsfremjandi tiltøk | Lógarbundin | 8.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21.8.01. | Fólkapensjón | Lógarbundin | 8.200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.8.05. | Fyritíðarpensjón | Lógarbundin | 1.200.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **11.250.000** | |

**Meting av útreiðslum á § 12 í 2014 samanborið við fíggjarlógina fyri 2014**

| *1.000 kr.* | **FL-2014** | **Meting 2014** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 26.003 | 26.038 | 35 | 0,1% |
| Rakstrarjáttan | 680.905 | 679.045 | -1.860 | -0,3% |
| Lógarbundin játtan | 1.008.560 | 1.021.635 | 13.075 | 1,3% |
| **Tilsamans** | **1.715.468** | **1.726.718** | **11.250** | **0,7%** |

# § 20 Inntøkur

## Játtanarliga støðan í september 2014

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 50.1.01. | Rentur at gjalda | Ógreinað | -4.700.000 | Nýggj meting |
| 50.2.01. | Rentuinntøkur av innistandandi | Ógreinað | 59.700.000 | Nýggj meting |
| 50.2.04. | Aðrar rentur | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 50.2.10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | Ógreinað | -5.500.000 | Nýggj meting |
| 52.1.01. | Vanligur landsskattur | Ógreinað | 35.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.07. | Felagsskattur | Ógreinað | -32.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.09. | Tilfeingis-/loyvisskattur | Ógreinað | -45.500.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 52.1.11. | Kapitalvinningsskattur | Ógreinað | -7.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.14. | Skattur av pensjónsinngjøldum | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.25. | Arvagjøld | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.27. | Gjald til Heilsutrygd | Ógreinað | 4.500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 51.1.28. | Gjald til barsilsskipan | Ógreinað | 2.500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 52.2.01. | Meirvirðisgjald | Ógreinað | 70.000.000 | Nýggj meting |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 52.2.04. | Tollavgjøld | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.07. | Punktgjøld | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.10. | Lønhæddargjald | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.14. | Loyvisgjald á alivinnu | Ógreinað | 54.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 52.2.15. | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | 7.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.19. | Skrásetingargjald | Ógreinað | 8.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.22. | Vegskattur (vektgjald) | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.25. | Ferðaavgjald | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.28. | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | Ógreinað | -200.000 | Nýggj meting |
| 52.2.30. | Tinglýsingargjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.04. | Útluting frá partafeløgum og grunnum | Ógreinað | -8.500.000 | Nýggj meting |
| 52.3.10. | Aðrar inntøkur | Ógreinað | -18.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.01. | Endurrindan av keyps-MVG | Ógreinað | -37.000.000 | Nýggj meting |
| **Tilsamans** | | | **73.300.000** | |

## Løgujáttanareftirlit

Løgukarmurin er 277 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2014. Harafturat eru 184 mió. kr. fluttar frá undanfarnum árum, umframt at eykajáttanir er samtyktar fyri 4 mió. kr. Samlaða játtanin til løgur í 2014 við framfluttum játtanum og eykajáttanum er sostatt 467 mió. kr. Av hesum verður roknað við, at 396 mió. kr. verða nýttar í 2014. Samlaða avlopið verður sostatt 71 mió. kr. Játtanarliga støðan á ymisku løgujáttanunum er útgreinað niðanfyri.

| *Heiti (1.000 kr.)* | **Flutt frá eldri árum** | **FL 2014** | **EyJ 2014** | **Játtan tilsamans 2014** | **Mett nýtsla 2014** | **Væntað óbrúkt játtan 2014** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Løgmansfyrisitingin** | **0** | **2.000** | **0** | **2.000** | **2.000** | **0** |
| Umbygging í Tinganesi | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 | 2.000 | 0 |
| **Fíggjarmál** | **23.278** | **85.300** | **-800** | **107.778** | **104.778** | **3.000** |
| Umvæling av almennum bygningum* | 0 | 25.000 | -800 | 24.200 | 24.200 | 0 |
| Nýggir Landsvegir | 22.293 | 64.100 | -2.100 | 84.293 | 76.293 | 8.000 |
| Havnir | 985 | 5.200 | 2.100 | 8.285 | 8.285 | 0 |
| Almennir bygningar, søla | 0 | -9.000 | 0 | -9.000 | -4.000 | -5.000 |
| **Vinnumál** | **7.568** | **14.400** | **4.582** | **26.550** | **26.550** | **0** |
| Granskingarlund** | 5.055 | 0 | 1.832 | 6.887 | 6.887 | 0 |
| Strandfaraskip landsins | 2.513 | 14.400 | 2.750 | 19.663 | 19.663 | 0 |
| **Mentamál** | **101.056** | **104.000** | **0** | **205.056** | **169.056** | **36.000** |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 11.734 | 10.000 | 0 | 21.734 | 13.734 | 8.000 |
| Skúladepil við Marknagil | 64.866 | 85.000 | 0 | 149.866 | 132.866 | 17.000 |
| Studentaskúlin, HF, Eysturoy | 10.249 | 7.000 | 0 | 17.249 | 11.249 | 6.000 |
| Kringvarp Føroya, løga | 9.361 | 0 | 0 | 9.361 | 8.361 | 1.000 |
| Tjóðleikhús*** | 4.846 | 0 | 0 | 4.846 | 846 | 4.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heilsumál** | **15.062** | **39.000** | **0** | **54.062** | **42.062** | **12.000** |
| Apoteksverkið | 3.517 | 0 | 0 | 3.517 | 3.517 | 0 |
| Medicoteknisk tól | 0 | 9.000 | 0 | 9.000 | 9.000 | 0 |
| Landssjúkrahúsið | 5.253 | 25.000 | 0 | 30.253 | 18.253 | 12.000 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús | 6.292 | 5.000 | 0 | 11.292 | 11.292 | 0 |
| **Almannamál** | **37.431** | **32.250** | **1.400** | **71.081** | **51.081** | **20.000** |
| Bústovnar o.a. | 37.431 | 32.250 | 1.400 | 71.081 | 51.081 | 20.000 |
| **Løgujáttanir tilsamans** | **184.395** | **276.950** | **5.182** | **466.527** | **395.527** | **71.000** |

Viðmerkingar:
* Eykajáttan umbiðin í september.
** Eykajáttan við átekning umbiðin í september.
*** Átekning umbiðin í eykajáttan í september.